## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av suðri og landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og stundum sirm ella mjørki. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Fríggjadagin andøvsgul av eystri og landnyrðingi, leygardagin snarar hann í útnyrðing. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 10 og 14 stig.

# Stilli



*Edvard Joensen*

Tað hendir ikki tað stóra á Leynavatni ein slíka stillan summarmorgun. Laksurin er ikki rieðiliga komin niðan enn, og bara okkurt hendinga smásíl kemur spakuliga sníkjandi undan vatnskorpuni. Kikkandi eftir ondini og tekur eitt sindur av ilt, sum steindeyða vatnið eftir øllum at døma hevur ov lítið av ein slíkan morgun.

Í slíkum løtum stendur mestsum alt kring teg stilt. Sjálvt tey altíð so málmiklu tjøldrini tykjast vera uppsteðgað. Ikki eitt kis hoyrist til teirra.

Tað sæst ein vørrur yviri undir Klyvjunum. Tað er helst ein villdunna ella ein topont, sum kemur svimjandi í konvoj við nøkrum ungum. Er so mikið langt burtur enn, at eg síggi ikki, hvat slagið er.

Uppi í haganum er seyðurin enn ikki farin at bíta. Er líka friðaligur sum alt annað í morgun. Sjálvt áin tykist liggja í Tornurósusvøvni. Fer sjabbandi oman við bakkanum. Ikki so frægt, at hon tutlar.

Mjørkaflókin móti Reynsatindi stendur í stað. Er ongan veg farin hesa løtuna.

Tað er bert konvojin, sum kemur hendanveg niðan efti vatninum, sum flytir seg. Tað er ein dunna. Einar fimm-seks ungar hevur hon afturút.

Alt tykist standa í stað. Uttan klokkan. Ivaleyst átti hon eisini at verðið steðgað eina slíka løtu.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 12 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 19 |
| Tromsø | 19 |
| Bergen | 14 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 20 |
| Berlin | 25 |
| Warzawa | 26 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 29 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 30 |
| Róm | 30 |
| Malorca | 32 |
| Athen | 30 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 11 |
| New York | 22 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 27 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | -- |
| La Paz | 8 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 9 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1001 hPa. norðan fyri Føroyar fer norðureftir. Eitt annað lágtrýst, 1006 hPa. vestan fyri Írland fer í landnyrðing.




**Í dag:**
Lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið haðani verður væntandi yvir Føroyum mikudagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 18/07 kl. 06[00]–19/07 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 11,3°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 19 mm – mált frá 18/07 kl. 06[00]–19/07 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 42,1 mm




fæst á apotekunum kring landið

## VESTFALLSKYRRINDI

9. juli: Seinna kvarter
14. juli: Mánin longst frá jørðini
17. juli: Tendring
25. juli: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. juli | 09.48 | 22.09 | 08.48 | 21.09 | 09.03 | 21.24 | 11.48 | — | 00.27 | 12.48 | 08.03 | 20.24 | 07.03 | 19.24 | 10.03 | 22.24 | 11.03 | 23.24 | 09.33 | 21.54 | 10.48 | 23.09 |
| 21. juli | 10.27 | 22.46 | 09.27 | 21.46 | 09.42 | 22.01 | 00.09 | 12.27 | 01.09 | 13.27 | 08.42 | 21.01 | 07.42 | 20.01 | 10.42 | 23.01 | 11.42 | — | 10.12 | 22.31 | 11.27 | 23.46 |
| 22. juli | 11.05 | 23.24 | 10.05 | 22.24 | 10.20 | 22.39 | 00.46 | 13.05 | 01.46 | 14.05 | 09.20 | 21.39 | 08.20 | 20.39 | 11.20 | 23.39 | 00.01 | 12.20 | 10.50 | 23.09 | — | 12.05 |
| 23. juli | 11.43 | — | 10.43 | 23.02 | 10.58 | 23.17 | 01.24 | 13.43 | 02.24 | 14.43 | 09.58 | 22.17 | 08.58 | 21.17 | 11.58 | — | 00.39 | 12.58 | 11.28 | 23.47 | 00.24 | 12.43 |
| 24. juli | 00.02 | 12.23 | 11.23 | 23.44 | 11.38 | 23.59 | 02.02 | 14.23 | 03.02 | 15.23 | 10.38 | 22.59 | 09.38 | 21.59 | 00.17 | 12.38 | 01.17 | 13.38 | — | 12.08 | 01.02 | 13.23 |

5 707265 100029 >